# Útbygt Xplore til løgtingslimir

**Í desember bleiv avtala gjørd millum altjóða oljufelagið Eni og føroyska felagið Simprentis um rættindini til oljusimulatiónina Xplore. Farið er undir at útbyggja simulatiónina, og í næstum verða oljuleitingarskeið marknaðarførd bæði innan- og uttanlands**



*Ólavur Ellefsen, undangongumaður aftanfyri Xplore-verkætlanina, sum nú hevur fingið luft undir veingirnar*

OLJULEITING Á TELDU
*Jan Müller*

Xplore hevur til endamáls at geva eina grundleggjandi fatan av oljuleiting og bleiv ment í sambandi við eina kapping millum føroyskar miðnámsskúlar í 2002.

### Letur hurðar upp

Í høvuðsheitum sigur avtalan millum Eni og Simprentis (áður kent undir navninum Tökni), at Simprentis fær øll rættindi til Xplore, samstundis sum at Eni fær eitt ávís tal av oljuleitingarskeiðum frá Simprentis ókeypis.

Eni er eitt av heimsins týdningarmestu oljufeløgum, og Simprentis-skeiðini skulu veitast bæði til starvsfólk hjá Eni og í sambandi við førleikamenning í teimum londum, har Eni leitar eftir olju.

Ólavur Ellefsen, stjóri í Simprentis, sigur við Sosialin, at avtalan við Eni er sera týdningarmikil fyri føroyska felagið. – Ikki minst, tí hetta kann lata okkum hurðar upp um allan heim.

### Útbygd útgáva

Xplore verður í løtuni útbygt og gjørt klárt til at blíva veitt á fyrstu almennu oljuleitingarskeiðunum, sum ætlandi verða í skeiðshølum í Aberdeen 10. februar, í London 12. februar og í Tórshavn 25. februar.

Útbygda útgávan eitur Xplore Advanced, og tað er henda útgáva, sum verður nýtt í bæði almennum skeiðum og serskeiðum. Kundar eru oljufeløg sum Eni, og eitt nú tænastuveitarar í oljuvinnuni, fíggjarfyritøkur, lærdir háskúlar og myndugleikar.

Uppruna útgávan broytir samstundis navn til Xplore Basic, og hon fer fyrst og fremst at blíva brúkt í sambandi við tiltøk fyri skúlanæmingar.

### Skeið í Føroyum

Sum skilst fer Simprentis eisini at bjóða skeið í Føroyum, og umframt almennu skeiðini nevnir Ólavur Ellefsen møguleikan at skipa fyri serskeiðum fyri fyritøkum og myndugleikum.

– Nú ætlanin er at fara undir næsta útbjóðingarumfar í Føroyum átti nývalda løgtingið at fingið gagn av einum oljuleitingarskeiði, heldur stjórin á Simprentis.

– Ein góð fatan av oljuleiting og gott skil á hugtøkum, sum eitt nú loyvistreytir og rakstrarverdar nøgdir munnu koma væl við, tá stórar avgerðir skulu takast um føroysku oljuframtíðina.

Skeiðini frá Simprentis taka støði í, at tú lærir best tá tú sjálv/ur tekur virknan lut í undirvísingini. Í oljusimulatiónini verða luttakarar býttir í bólkar, sum kappast, samstarva og taka avgerðir í oljuleitingini í einum hugsaðum oyggjalandi.

Endamálið er ikki at útbúgva serfrøðingar, men heldur at geva eina fatan av avbjóðingum og møguleikum í vinnuni.

Komandi november verður – eins og í 2003 – eitt millumtjóða tiltak, har Xplore Basic verður nýtt til at geva miðnámsskúlanæmingum eina fatan av oljuleiting. Eisini verður arbeitt við líknandi tiltaki fyri lærdar háskúlar í fleiri londum, men tað er enn ikki staðfest, nær tað tiltakið verður.

# I AM komið á svenskan hitlista

**Tað er ikki bara í Føroyum, at gospelbólkurin I AM hevur undanvind. Nú eru teir komnir á ein hitlista í Svøríki**



*Sangurin Believe hjá I AM er komið á ein svenskan hitlista fyri kristiligan tónleik*

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Fyri jól gav gospelbólkurin I AM út sína næstu fløgu. Hetta er útgáva við kristiligum rocktónleiki, sum var sera væl móttikin í Føroyum.

Eini túsund fløgur fóru í umfar longu fyrstu vikuna, og síðani hevur I AM hava nógvar framførslur kring landið.

Bólkurin hevur eisini sagt, at teir í ár fara at stíla meira eftir at sleppa út um landoddarnar at spæla.

Og teir í I AM kunnu í øllum førum fegnast um, at onkur lurtar eftir teirra tónleiki í útlondum.

### Komnir á hitlista

Crossnet er ein svenskur ungdómsportalur fyri trúgvandi, og har hava tey eitt internetradio, sum spældir kristnan tónleik.

Portalurin hevur eisini ein hitlista yvir tann best umtókta tónleikin á rásini, og har er I AM alt í einum sloppið upp í part.

Bólkurin er nýggjur á listanum og liggur sum nummar 7 við sanginum Believe.

Onnur nøvn á listanum eru DC Talk, P.O.D. og Nikki Leonti, sum er nummar 1.

I AM hevur sent nýggju fløguna til útvarpsstøðir uttanlands, men teir vistu av ongum, fyrr enn teir endað á hesum svenska hitlista.

## Stórt blað týsdagin

Nógv tilfar slapp ikki við í leygardagsblaðið. Men tað verður pláss fyri tí týsdagin, tá vit eisini gera eitt eyka innlegg í blaðið. Millum tilfarið tá verður m.a. ummæli og myndir frá 10. konsertini hjá Føroya Symfoniorkestri í Norðurlandahúsinum sunnudagin.

# Klaksvíkingar á odda

**Klaksvíkar Billardfelag liggur á odda í báðum deildum í billard, nú kappingin er um at vera hálvrunnin**

BILLARD

Klaksvíkar Klubbi liggur klárt á odda í billardkappingini. Hann hevur 48 stig og 23,43 eygu í meðal. Nr. 2 er Kaggin 1 við 38 stigum og 18,05 eygum í meðal. Nr. 3 er Havnar Klubbi við 28 stigum og 19,39 eygum í meðal, nr. 4 er Tvøroyrar Billardfelag við 16 stigum og 15,76 eygum í meðal og aftast er Kaggin 2 við 14 stigum og 16,35 eygum í meðal. Øll liðini hava spælt trý umfør uttan Havnar Klubbi, sum hevur spælt fýra. Seinasta vikuskiftið vitjaði botnliðið í 1. deild Kaggin 2 í Havnar Klubba. Gestirnir vunnu heldur óvæntað 10-8.

Fleiri dystir verða í vikuskiftinum. Tvøramenn vitja Kaggan 2 og Kaggin 1 er á vitjan í Klaksvík

### 2. deilld

Her er støðan tann, at klaksvíkingar – Klaksvíkar Billardfelag 2 - eisini liggja á odda við 44 stigum, nr. 2 er Havnar Klubbi við 39 stigum, nr. 3 er Klaksvíkar Klubbi 1 við 24 stigum, nr. 4 er Kaggin við 17 stigum, og nr. 5 er Tvøroyrar Billardfelag við 18 stigum.

# Kuupik loysir Tobba av

**Nýggjur samskipari fyri virkseminum hjá Norðuratlantsbólkinum er grønlendski fólkatingsmaðurin Kuupik Kleist**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Báðir teir grønlendsku og annar av teimum føroysku fólkatingslimunum tóku seg í 2001 saman í ein bólk í Fólkatinginum.

Norðuratlantsbólkurin hevur síðani samstarvað um viðurskifti, sum hava serligan áhuga fyri Føroyar og Grønland.

Tá ið avtalan varð gjørd millum teir tríggjar politikararnar var samstundis gjørt av, at uppgávan sum samskipari hjá bólkinum skuldi ganga upp á skift millum teir tríggjar.

Lars Emil Johansen legði fyri, og síðani hevur Torbjørn Jacobsen røkt uppgávuna. Nú hevur so Kuupik Kleist tikið við.

Uppgávan sum samskipari hevur við sær, at Kuupik skal standa fyri fundum, roknskapi og dagligu umsitingini hjá Norðuratlantsbólkinum. Haraftur-at skal hann verða almenna umboðið hjá bólkinum.

Kuupik Kleist er umboð fyri Inuit Ataqatigiit, sum er ein vinstrasinnaður flokkur, og hann situr eisini í grønlendska landstinginum. Hann hevur verið landsstýrismaður og var eitt skifti uttanríkisstjóri hjá grønlendska heimastýrinum.



# Lodnuveiðan undir Íslandi steðgað fyribils

ÍSLAND
*Edvard T. Jónsson*

Íslendskir sjómenn átala fiskimálaráðið harðliga fyri at steðga lodnuveiðuni í tvær vikur fram til 29. í januar. Íslendski fiskimálaráðharrinn avgjördi nú í vikuni at steðga veiðuna eftir at Fiskirannsóknarstovan hevði sent 10 skip til at kanna stöddina av lodnustovninum norður og eystur av landinum 3.-5. januar. Fiskirannsóknarstovan sigur at hóast skipini hövdu funnið nógva lodnu var hon ógvuliga spjadd og skipað lodnuveiða var ov vandamikil fyri stovnin undir hesum umstöðum. Fiskirannsóknarstovan vil gera nýggjar metingar av stovninum áðrenn lodnuskipini kunnu byrja at royna aftur.

Skiparin á lodnuskipinum Gudmundur Olafur sigur at teir hava funnið nógva lodnu norður og eystur av landinum, serliga eystan fyri Langanesi har teir fingu80 tons av stórari lodnu í einum háli. Nögdin teir fingu var nógv störri enn teir roknaðu við í mun til tær metingar teir hövdu gjört frammanundan. Lodnuskiparararnir siga at tað er púra ábyrgdarleyst hjá fiskirannsókanrstovuni at steðga lodnuveiðuna beint nú tí byrjanarkvotan er bert 362.000 tons. Teir siga eisini at einki nyttar at steðga veiðuna og hava síðan bara eitt skip til at meta um lodnuna á ökinum norðan- og eystanfyri.

Sambært íslendsku sölufyritökurnar er stöðan á lodnumarknaðinum sera góð í lötuni. Einki mark er fyrir hvussu nógv kann seljast fyrri part ársins, sigur Teitur Gylfastjóri stjóri hjá SÍF sölufyritökuni. Roknað verður eisini við at prísurinn hækkar. Norðmenn hava rátt fyri marknaðinum í Japan seinastu 4 árini men teir selja onga lodnu til Japan í ár. Lítið sum einki er av lodnu á goymslu í Japan tí framleiðslan seinasta ár var so lítil. Japansmarknaðurin kann sostatt taka ímóti 20.000 tonsum frá Íslandi. Prísurinn fyrir lodnu og svartkjaft lækkaði 1999 tá Norðmenn komu inn á marknaðin men Teitur Gylfason sigur at líkindi eru til at hann kann hækka munandi aftur.








